VELJARAKANNING

Greiður meiriluti í øllum aldurs-bólkum sigur »ja«

Eirikur Lindenskov

Stórur meiriluti er í øllum aldursbólkum fyri, at løgtingið skal loyva samkyndum at giftast borgarliga.

Tað vísir kanningin, sum Gallup Føroyar hevur gjørt fyri Miðla-húsið og Kringvarpið.

Gallup hevur tey, sum hava svarað, í fimm aldursbólkar:

18-24 ár:
Ja: 79 prosent
Nei: 15 prosent
Veit ikki: 6 prosent

25-39 ár:
Ja: 76 prosent
Nei: 19 prosent
Veit ikki: 5 prosent

40-49 ár
Ja: 63 prosent
Nei: 36 prosent
Veit ikki: 1 prosent

50-59 ár
Ja: 61 prosent
Nei: 29 prosent
Veit ikki: 10 prosent

60+ ár
Ja: 53 prosent
Nei: 40 prosent
Veit ikki: 5 prosent



STÓRUR MEIRILUTI FYRI AT SAMKYND KUNNU GIFTAST

Eirikur Lindenskov

– Stórur meiriluti av Føroya fólki er fyri, at fólk av sama kyni skulu kunna giftast.

Tað er greiða niðurstøðan í kanning, sum Gallup Føroyar hevur gjørt fyri Miðla-húsið og Kringvarpið.

Gallup Føroyar spurdi í døgunum 16. til 19. apríl soleiðis:

»Tekur tú undir við, at hjúnabandslógin verður broytt soleiðis, at tvey av sama kyni kunnu giftast borgarliga (tvs. ikki í kirkju)?«

»Ja« svaraðu 64 prosent.

»Nei« svaraðu 30 prosent.

5 prosent svaraðu »veit ikki«

Í kanningini eru 532 tilvildarliga vald fólk, sum eru eldri enn 18 ár, spurd.

Býtið millum, hvussu kynini svara, er rættiliga javnt.

Av teimum, sum svaraðu »ja« eru 65 prosent kvinnur og 64 prosent menn

Av teimum, sum svaraðu »nei« er býtið púra javnt, 30 prosent av báðum kynum.

Av teimum, sum svaraðu »veit ikki« eru 5 prosent kvinnur og 6 prosent menn.

Samkynd giftast: Veljarar hjá seks flokkum siga ja

Í seks av teimum sjey flokkunum á tingi er meiriluti fyri at loyva fólki av sama kyni at giftast borgarliga

Eirikur Lindenskov

Tað vísir kanningin, sum Gallup Føroyar hevur gjørt fyri Miðlahúsið og Kringvarpið.

Høvuðsniðurstøðan í kanningini er, at 64 prosent av Føroya fólki eru fyri at loyva fólki av sama kyni at giftast borgarliga, meðan 30 prosent eru ímóti.

Kanningin byggir á svar frá 532 fólkum kring landið, sum eru yvir 18 ár, ið eru spurd.

Tá kanningin greinar, hvat fólk sum velja hendan ella handan flokkin halda, so verður óvissan sum vera man hægri, og tí skulu svarini upp á, hvussu býtið er inni í ymsu flokkunum takast við størri fyrivarni enn høvuðstølini í kanningini.

Men sambært kanningini, so eru tað serliga veljarar hjá Framsókn, sum vilja loyva fólki av sama kyni at giftast borgarliga. Tí tað siga 89 prosent av teimum, sum siga seg velja Framsókn.

Næststørsta undirtøkan er millum veljarar hjá Tjóðveldi. Har eru 83 prosent fyri.

Í Javnaðarflokkinum eru 75 prosent fyri.

Millum veljarar hjá Nýggjum Sjálvstýri eru 62 prosent fyri.

Hjá Fólkaflokkinum og Sambandsflokkinum eru 50 prosent fyri.

Miðflokkurin er einasti flokkur í kanningini, sum hevur fleiri veljarar, sum eru ímóti at fólk av sama kyni skulu kunna sleppa at giftast borgarliga.